


*Bretski fiskimálaráðharrin, Ben Bradshaw og Jóannes Eidesgaard á landsstevnu hjá Javnaðarflokkinum í Havn.*

*Mynd: Jan Müller*

# Av Javnaðarstevnu í Havn á Labourkongress í Brighton

**Tá bretski fiskimálaráðharrin vitjaði á landsfundi Javnaðarfloksins í Havn leygardagin, fegnaðist hann um at vera boðin á fund hjá einum systurflokki, sum sat við stjórnarvaldið, tí færri og færri javnaðarflokkar í Evropa í dag sita við stjórnarvaldinum**

LANDSFUNDIR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tað man neyvan verða hent áður, at ráðharri í úr einum av stórveldunum í heiminum, í hesum føri grannatjóð okkara Bretlandi, vitjar og heldur røðu á eini landsstevnu hjá tí føroyska Javnaðarflokkinum. Í ár hendi tað so, og forkunnugi gesturin var eingin minni enn breski fiskimálaráðharrin, Ben Bradshaw.

Í sambandi við almennu vitjanina, har bretski fiskimálaráðharrin fekk innlit í føroyska fiskivinnu gav hann sær leygarmorgunin stundir til at vitja politisku felagar sínar í Føroyum, tá hesir hildu landsstevnu í Læraraskúlahøllini.

Við ljómandi og inniligu føroysku røddini hjá okkara frægа tónleikara, Steinley Samuelsen varð hesin framstandandi bretski politikarin móttikin av eini væluppplagdari fjøld av fólki og teirra millum sjálvum formanninum í Javnaðarflokkinum og løgmanni, Jóannes Eidesgaard. Har vóru so eisini allir tingmenninir og umboð fyri lokalfeløgini kring landið.

Ben Bradshaw dámdi væl hugnaligu atmosferuna og serføroysku tónarnar, sum rungaðu um høllina og fegnaðist um at hava fingið høvið at støkka inn á gólvið á hesi javnaðarkongressini, nú hann, sum hann málbar seg, varð ávegis til Brighton at sita við lið Tony Blairs á eini aðrari javnaðarkonkress, nevniliga árligu Laborkongressini har.

Hann bar fram heilsu frá Labourflokkinum og her eisini Tony Blair og fór hann nú at bera honum eina heilsu úr Føroyum frá løgmanni og føroyska javnaðarflokkinum.

Bretski ráðharrin viðgekk, at hann visti lítið um Føroyar, áðrenn hann kom á vitjan og helt fyri, at bretar høvdu uttan iva nógv at læra av føroyingum í fiskivinnumálum, men hann legði eisini dent á, at Føroyar eru eitt gott og spennandi land at vitja hjá fremmandafólki, eitt nú bretum.

Hann tók tó eisini í egnan barm og viðgekk, at sjálvur kendi hann ikki søguna um, áðrenn hann kom tikl Føroya, at føroyingar høvdu hildið lív í onglendingum undir øðrum veraldarbardaga, sum hann nevndi vera svartasta tíðin í bretskari søgu.

### Fegnaðist um støðuna her

Hann fegnaðist annars um at vera boðin á fund hjá einum systurflokki, sum sat við stjórnarvaldið, tí færri og færri javnaðarflokkar í Evropa í dag sita við stjórnarvaldinum. Hann nevndi, at Labour og Javnaðarflokkurin hava sama grundleggjandi virðisgrundarlag sum er tað góða samfelagið, hóast flokkarnir eru ymiskir á máli á ymiskum økjum.

Ben Bradshaw legði dent á, at javnaðarflokkar kring heimin mugu stríðast í felag, og hann vónaði, at Javnaðarflokkurin slapp at halda fram við stjórnarvaldinum í Føroyum, eins og hann vónaði, at Labour vinnur valið komandi ár í Bretlandi.

Á fundinum leygarmorgunin varð altjóða arbeiðarasangurin sungin, og Ben Bradshaw helt eitt sindur kensluborin fyri, at hetta var fyrstu ferð í fleiri ár, at hann hevði sungið sangin. Síðani gekk leiðin vestur í Vágar saman við bretska konsulinum í Føroyum, Tummas Hanusi Dam, sum hevur tikið sær væl av bretska gestinum seinastu dagarnar.



*Ben Bradshaw og Krisjan Magnussen, formaður í tingbólki Javnaðarfloksins*

*Mynd: Jan Müller*



Bretski fiskimálaráðharrin:

# Vil broyta fiskivinnupolitikkin hjá EU



*Formaðurin í Vinnunevndini, Hendrik Old og Ben Bradshaw høvdu nógv at tosa um á landsfundinum. Aftanfyri Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður*

*Mynd: Jan Müller*

**– Soleiðis at lond sum Føroyar, Noreg, Ísland og Grønland kunnu gerast limir**

FISKIVINNUPOLITIKKUR OG EU
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Herfyri vitjaði bretski fiskimálaráðharrin Ben Bradshaw í Føroyum. Hann sigur í samrøðu við Sosialin, at tað varð Tony Blair sjálvur, sum heitti á seg um at fara til Føroya at læra nakað um fiskivinnuna her.

– Okkara formaður hevur heldur ikki gloymt tann stóra týdning, ið arbeiðið, sum føroyingar gjørdi fyri bretar undir krígnum, hevði – og skuldi eg eisini bera hesa heilsan víðari.

Hóast bretar hava verið við til at skipa og góðtaka fiskivinnupolitikkin hjá EU, so er tað vorðið alt meira sjónligt, at hesin politikkur í dag als ikki livir upp til tørvin hjá fiskivinnuni í Bretlandi. Og tað er so m.a. fyri at kunna ávísa nýggjar og betri leiðir í fiskivinnupolitikkinum, at Blair hevur sent Bradshaw til Føroya.

Sjálvur sigur Ben Bradshaw seg væl skilja, at Føroyar vilja standa uttan fyri EU og eru ímóti fullum limaskapi, nú samfelagið er so bundið at eini vinnu og at limaskapur hevði ført til trupulleikar fyri Føroyar út frá felags fiskivinnupolitikkinum, sum sigur, at øll lond skulu sleppa at fiska frítt hjá hvørjum øðrum.

– Men eg vóni, at framtíðar fiskivinnupolitikkurin í EU vónandi fer at verða endurskoðaður, soleiðis at Føroyar eina ferð í framtíðini, sjálvandi treytað av um Føroyar ynskja tað og tá hava lættari at taka hesa avgerð, kunnu fara upp í EU.

– Men við síni støðu í EU er Bretland tá yvirhøvur ført fyri at broyta fiskivinnupolitikkin soleiðis, at Føroyar kunnu gerast limur?

– Eg haldi, at har er ein møguleiki. Og tað er hetta vit royna at fáa framt. Vit royna at fáa hini londini við til at gera fiskivinnupolitikkin meira liðiligan og í størri mun lata lokaløkini standa fyri honum. Eg vóni, at tað fer at eydnast okkum.

Ben Bradshaw viðgongur, at hetta er ein stór avbjóðing men hann heldur hon er av alstórum týdningi.

– Tað er nevniliga ein sannroynd í dag, at fiskivinnupolitikkurin hjá EU ikki hevur verið væleydnaður. Tað meina fleiri EU lond og eisini EU nevndin sjálv. Tað, sum eg havi lært á vitjanini í Føroyum kann vónandi hjálpa mær at reformera bretskan politikk og tað kann so eins væl vera við til eisini skunda undir ynskini at reformera og endurskoða allan EU fiskivinnupolitikkin.

– Men hvat kunnu lítlu Føroyar læra tí stóra Bretland um fiskivinnu?

– Oftani kunnu smærri pláss læra størri pláss nógv. Tit hava megnað at byggja upp ein góðan fiskiídnað, hóast tykkara umstøður eru øðrvísi enn tær í Bretlandi, men eg haldi kortini, at vit kunnu læra nógv av tykkum.

Tit hava góðan vilja og eru eitt raskt fólk. Tit eru sera blíð og vinarlig. Kunnu politikarar, fiskiídnaður og politi karnir í Bretland i arbeiða meira saman, so trúgvi eg eisini, at vit kunnu fáa eina meira lønsama og burðardygga fiskivinnu enn vit hava í dag. Og har trúgvi eg nettupp vit hava nógv at læra av tykkum.

## Grindafyrilestrar á Sunda Bókasavni

**Dorete Bloch Danielsen og Bjarni Mikkelsen frá Náttúrugripasavninum halda fyrilestur um grindakanningar og grindamerking á Sunda bókasavni**

FYRILESTUR
*Tíðindaskriv*

Føroya Náttúrugripasavn hevur í mong ár skipa fyri kanningum av grind. Dorete Block Danielsen fer at greiða frá um gomlu grindahagtølini, lívfrøði so sum føði, aldurbýtið, kynsbýtið, nøring og vøkstur hjá grindhvali og um hvussu gamla grindamátið samsvarar við støddina á hvalunum.

Bjarni Mikkelsen fer at greiða frá merking av grindahvalum og hvørjar upplýsingar um ferðing og kaving kunnu fáast burtur úr hesum.

Fyrilestarnir vera í Skálanum á Norðskála - Oyrar skúla týskvøldið klokka 20. Bókasavnið vísir fram greinar og bøkur um grind og hval, og eldri og sum nýggjur grindareiðskapur verður at síggja.

## Sjálvsstýrisfelagið skipað

AÐALFUNDUR
*Tíðindaskriv*

Suðurstreymoyar Sjálvstýrisfelag hevði aðalfund 15. septembur. Valda nevndin hevur skipað seg soleiðis:

Carl August Arge, formaður
Jóanes N. Dalsgaard, næstformaður
Annleyg Lamhauge, skrivari
Svenn Brimheim, kassameistari
Anna Louisa Joensen, nevndarlimur

Felagið hevur fyrsta uppstillingarfund til Býráðsvalið mánakvøldið 4. oktobur; annar, og møguliga triði uppstillingarfundur, verður mánakvøldið 11. oktobur. Báðir fundirnir vera kl. 19:30 í hølum felagsins í Tildugøtu 9. Nýggir limir eru vælkomnir.

# Blair megnaði at flyta USA

LANDSFUNDUR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

– Hóast flokkarnir eru ymiskir á fleiri økjum, so ganga vit inni fyri somu samfelagsvirðum – fyri einum góðum samfelag og eisini altjóðagerð. Tað hevur ongantíð verið so nógv brúk fyri altjóðagerð sum nú, har altjóða yvirgangur stendur frammaliga, har stórir trupulleikar eru í Irak, og har vit hava eitt sera sterkt USA, sum vit ynskja skal virka innan fyri altjóða skipanina og ikki einsamalt og uttan fyri hesa.

Hetta sigur bretski fiskimálaráðharrin Ben Bradshaw við Sosialin, eftir at hava verið gestur á landsfundi hjá føroyska javnaðarflokkinum.

Ráðharrin hevur einki ímóti at tosa um Irak og heldur fyri, at mong hava misfatað støðuna hjá Blair og Bretlandi í Irakmálinum.

– Politikkurin hjá Blair á hesum øki er rættur og hevur eitt endamálið verið at tryggja, at USA ikki fór í sjálvdrátt og bert koyrdi eftir egnum høvdi men í samstarvi við altjóða samfelagið. Eitt nú heldur at vilja brúka ST og stuðla teir altjóða stovnarnar, sum vilja virka fyri friði. Tað hevur tó ikki altið verið líka lætt hyggja vit eftir úrslitunum, men Tony Blair hevur megnað nakað á tí økinum heldur Ben Bradshaw fyri.

Hann vísir á, at tað í byrjanini var ein trekleiki í amerikonsku stjórnini at virka saman við ST, og hetta hevur verið nakað, sum Blair hevur roynt at bøtt uppá. Hann leggur tó dent á, at ST megnaði so heldur ikki nóg væl at medvirka til at loysa málini út frá sínum egnu samtyktum.

– Spurningurin er tí í hesum førunum, um ST hevur megnað at gjørt seg til eitt amboð til at gjøgnumføra altjóða lóg og tess egnu samtyktir! Hvat Irak viðvíkur, so hevur hetta ikki eydnast sigur Ben Bradshaw.